B36-ÍF:

# Nú er tíð til fótbóltin



**Meðan B36 stríðist av øllum alvi fyri oddasessinum, skal ÍF hava stig, um sleppast skal burtur frá botnstríðnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Støðan hjá mótstøðuliðunum í Gundadali sunnudagin er ikki heilt ólík. Í øllum førum ikki, um tosast skal um tørvin á stigum. B36 er eitt stig frá toppinum, og við dystinum á Skála, har HB vitjar, í mentu, er einki at ivast í, at teir enn eina ferð medda eftir trimum stigum. Fuglfirðingarnir eru hinvegin bara eitt stig frá tungu strikuni. Í niðara endanum er kappingin um stigini í minsta lagi líka hørð, sum hon er tað í oddinum, og hvørt tað einasta stigið kann merkja munin millum lív og deyða í deildini.

**Formula-deildin**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 22 | 12 - 8 - 2 | 48 | 23 | 25 | 44 |
| 2 | B36 | 22 | 12 - 7 - 3 | 31 | 13 | 18 | 43 |
| 3 | HB | 22 | 13 - 3 - 6 | 59 | 29 | 30 | 42 |
| 4 | NSÍ | 22 | 10 - 7 - 5 | 37 | 32 | 5 | 37 |
| 5 | EB/Streymur | 22 | 9 - 9 - 4 | 38 | 30 | 8 | 36 |
| 6 | KÍ | 23 | 7 - 3 -13 | 34 | 42 | -8 | 24 |
| 7 | GÍ | 22 | 6 - 4 -12 | 29 | 41 | -12 | 22 |
| 8 | ÍF | 22 | 5 - 6 -11 | 27 | 51 | -24 | 21 |
| 9 | VB | 23 | 5 - 5 -13 | 30 | 51 | -21 | 20 |
| 10 | TB | 22 | 3 - 6 -13 | 22 | 43 | -21 | 15 |

**2. deild menn**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 13 | 11 - 1 - 1 | 49 | 10 | 39 | 34 |
| 2 | B71 | 12 | 10 - 1 - 1 | 44 | 7 | 37 | 31 |
| 3 | FSV04 | 13 | 9 - 1 - 3 | 39 | 12 | 27 | 28 |
| 4 | AB | 13 | 8 - 2 - 3 | 31 | 23 | 8 | 26 |
| 5 | HB | 12 | 6 - 1 - 5 | 32 | 25 | 7 | 19 |
| 6 | LÍF | 13 | 4 - 2 - 7 | 37 | 37 | 0 | 14 |
| 7 | Sumba | 13 | 4 - 1 - 8 | 27 | 46 | -19 | 13 |
| 8 | Royn | 13 | 3 - 1 - 9 | 14 | 47 | -33 | 10 |
| 9 | B36 | 13 | 2 - 3 - 8 | 13 | 33 | -20 | 9 |
| 10 | GÍ | 13 | 0 - 1 -12 | 13 | 59 | -46 | 1 |

### Skaðar og leikbann

Í B36 hevur tað nógva av tosinum hesa vikuni gingið um, hvørt kappingarnevndin tók eina rættvísa støðu, tá revsingin fyri tilburðin á Tvøroyri skuldi mátast út. Tað tosið tykist tó nærkast endanum nú, tí sum tey siga, so er tað nú tíð til at spæla fótbólt aftur. Undir øllum umstøðum, so er avleiðingin, at Bergur Midjord ikki er tøkur sunnudagin. Tað er Klæmint Matras neyvan heldur, eftir at hann hevur fingið trupulleikar við einum vødda í lærinum.

Hjá ÍF hevur Rúni Elttør leikbann, eftir at hann fekk reytt kort seinast. Eisini Poul Ennigarð noyddist av vøllinum ta ferðin. Hjá honum var tó talan um skaða, og tað verður ikki roknað við, at hann verður tøkur. Og tað verður Gunnar Nielsen helst heldur ikki hesaferð. Hann hevur í longri tíð drigist við skaða í búkvøddunum, og enn røkist einki fyri, at hetta er komið í rættlag.

EB/Streymur-TB:

# Øvugt fortekn

**EB/Streymur er flúgvandi í løtuni, men TB skal í minsta lagi hava triðingin av stigunum, sum eftir eru at stríðast um**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Við fimm umførum eftir, er lykkjan um hálsin á tvøramonnum av álvara farin at merkjast. Hóast byrjanin upp á kappingarárið væl og virðiligа varð góðtikin, so hevur tað síðani hetta gingið verri enn illa. Liðið hevur ikki vunnið, síðani GÍ vitjaði á Sevmýru tann 16. mai, og í teimum 13 eftirfylgjandi dystunum hevur liðið bara vunnið sær trý stig.

Hevur úrtøkan verið vánalig hjá TB, so hevur hon verið júst tað øvuta hjá EB/Streymi, sum í ár stevnir beina kós móti besta úrsltinum í søgu felagsins. Higartil hevur besta endastøðan verið eitt sætta pláss, men verða bara tvey stig fingin afturat í seinastu fimm dystunum, verða tey hagtølini heilt víst betrað. Liðið hevur ikki tapt, síðani teir vitjaðu í Gundadali tann 12. juni, og í teimum 10 dystunum, sum síðani hava verið leiktir, hevur liðið fingið 20 stig. Og tá hevur skráin altso eisini talt útidystir móti Skála, B36 og NSÍ. Tríggir truplir dystir, sum tó kastaðu sjey av níggju møguligum stigum av sær!



*Formkurvarnar á Mølini sunnudagin peiggja beint í hvør sína ætt. Men hetta hevur TB ikki ráð at taka atlit til, nú endaspurturin skal vinna fimm stig inn í mun tal grannarnar fyri sunnan*

### Grundstuðlar mangla

Tí er einki at ivast í, at uppgávan hjá TB er serstakliga trupul. Og hon gerst ikki lættari av, at tveir av grundstuðlunum á liðnum ikki eru tøkir. Jón Johannesen fekk reytt kort, tá B36 vitjaði seinast, og komandi tríggjar dagarnar er hann so ikki tøkur. Og Dan Mortensen verður neyvan heldur tøkur. Hann varð skiftur út við skaða sunnudagin, og talan er helst um fipurskaða, sum so skal hava frið í nakrar vikur.

Hjá EB/Streymi tykist støðan við fólki vera á leið tann sama, sum hon var fyri viku síðani. Jákup Martin Joensen og Knút Vesturtún eru báðir skaddir, men sum skilst, so verður Jákup Martin kanska at síggja á beinkinum kortini.